# So kom útlendingamálið umsíðir



JÓANNES EIDESGAARD
løgmaður

**Broytingarnar í útlendingalógini eru tann besta bráðfeingis loysnin upp á trotið á arbeiðsmegi. Men samstundis veitir lógin trygd fyri, at føroyingar ikki verða skúgvaðir til viks fyri láglønta útlendska arbeiðsmegi**

Leingi er tað, sum væl skal verða, verður mangan tikið til. Broytingarnar í útlendingalógini hava verið ávegis í drúgva tíð, men nú hevur samgongan samtykt at leggja málið fram og fáa tað samtykt. Málið er eisini lagt fram í Fólkatinginum, so gongur alt, sum ætlað, so verður nýggja skipanin virkin um tveir mánaðir ella so. Tað fegnist eg um sum samgonguleiðari.

**Ein munadygg og smidlig skipan**
Stóri fyrimunurin við hesum uppskoti er, at tað verður munandi lættari at fáa hendur á evropeiskari arbeiðsmegi. Tá váttan er fingin um 30 tímar arbeiðsviku frá einum arbeiðsgevara, kemur útlendingurin inn og fær eftirfylgjandi útskrivað arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Ein avleiddur fyrimunur er eisini, at tað fer at bera til at skifta arbeiðsgevara uttan nýggja viðgerð hjá myndugleikunum. Hetta hevur ikki verið møguligt higartil.

Tað hevur av mongum verið ført fram, at fáa vit ikki atgongd til fleiri hendur í vinnuni, er vandi fyri, at hjólini fara at mala seinni. Hesin boðskapur hevur verið greiður. Tí hevur hetta málið ligið frammarlaga í politisku raðfestingini, hóast tað ikki gekk so skjótt, sum vit ynsktu.

Men alt hevur eina orsøk, eisini hetta. Gaman í hevur málið stóran týdning búskaparliga. Men tað skerst ikki burtur, at málið er eisini sera grundleggjandi fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Tí hevur tað ligið okkum nógv á sinni at fáa eitt uppskot, sum partarnir, um ikki beinleiðis skuldu fegnast um, men tó kunnu liva við. Hetta haldi eg avgjørt hevur eydnast.

**Fastlønarskipan**
Fakfeløgini hava serliga funnist at trimum viðurskiftum: framíhjárættiurin, kunningin og eftirlitið. Viðvíkjandi tí fyrsta, so er tað væl skiljandi, at fakfeløgini eru á varðhaldi, um útlendsk arbeiðsmegi fær betri sømdir enn okkara egna. Við trygd fyri 30 tímum um vikuna, har okkara egna onga slíka trygd hevur, er henda atfinning til at skilja. Men Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur givið greiða melding um, at tey vilja taka stig til samráðingar um eina fastlønarskipan fyri fiskavirkisarbeiðið, so tað er upp til partarnar á arbeiðsmarknaðinum at gera av og fáa hesa skipan í lag. Um tað eydnast, kann so ótrúliga nógv meira verða vunnið, og hetta vil verða størsti sigur á arbeiðsmarknaðinum í mong Harrans ár.

Vert er eisini at geva gætur, at í uppskotinum stendur, at fer arbeiðsloysið upp um 3,5% í einum tríggjar mánaðar skeiði, verður lógin óvirkin. Harafturat skulu útlendingar hava somu lønarviðurskifti sum føroyingar. Tí veitir lógin trygd fyri, at undirlønt útlendsk arbeiðsmegi ikki floymir føroyska arbeiðsmarknaðin, og føroyingar verða skúgvaðir til viks.

**Samskipan av útlendingaøkinum**
Viðvíkjandi kunning og eftirliti, fer landsstýriskvinnan við útlendingamálum at seta á stovn eina útlendingaskrivstovu, sum m.a. skal átaka sær hesar skyldur.

Útlendingastovan skal saman við løgmálaráðnum eisini fara í gongd við at fyrireika yvirtøkuna av øllum útlendingamálinum. Tá kunnu vit sjálvi gera av, hvussu vit skipa henda trupla partin av okkara politikki og tillaga hann okkara egnu viðurskifti.

Hetta uppskotið er eitt stig rætta vegin. Alt í alt ein skilagóð tilgongd, hóast tíðin gjørdist nakað drúgv.

# Sigurd Poulsen og Sandoyartunnilin



GERHARD LOGNBERG
løgtingsmaður og borgarstjóri

Eg hevði sett meg væl fyri við døgurðaborðið, har var borðreitt við tí síðstu máltíðini av feskari grind, sum eg átti í boksini, samstundis rætti eg meg til at koyra útvarpið frá.

Jú tað fyrsta eg hoyrdi var Sigurd Poulsen, landsbankastjóra, sum átti pápa her úr Skopun og ber navni hjá abba sínum úr Skopun.

Eg sessaðist við borðið og skar mær ein stóran spikbita og tilsvarandi av grind. Eg hugsaði, at nú var útvarpsmaðurin farin á glattan ís, men eg hugsaði fast takið tær, nú fær tú skorfleingina.

Nú var eg um at seta í rangastrupan. Sigurd gav tí fólki, sum hann hevði røtur til, fótin í eitt víst stað, síðan trakkaði hann fólki sunnan fyri Skopunarfjørð undir halin.

Meðan eg gekk í døpurhuga, ringdi ein vinnmaður úr Klaksvík, sum eg havi sitið í tinginum saman við, hann segði, Gerhard, tak tær ikki tyknir av tú, sum Sigurd Poulsen hevur at bera fram, hann hevði sama boðskap um Norðoyatunnilin.

Men tú ger tað sama Sigurd Poulsen, tú fer í tað kórið, har mest fólk er í, og harvið roknar tú við nøkrum eyka poengum frá teimum, sum tú heldur sita sikrast á toppinum.

Men heilt erligt, hví roynur tú nú at sabotera Sandoyartunnilin, tað hevur ongantíð verið mansligt at sparka ein liggjandi.

Tí sum støðan er, meti eg Sandoynna liggja lágt, ikki tí at vit ikki eiga eitt gott fólk, men oyggin hevur onga raðfesting fingið frá tí politiska myndugleikanum.

Sandoyartunnilin kann fíggjast við 20 mió um árið í 20 ár, ella longri áramál, kanska 30 ár. Eftir tað hevði hann hvílt í sær sjálvum. Tá taki eg ikki tað við, at Teistin er ein góð salgsvøra, Sandoyarsiglingin gevur hall, Hestrutan gevur hall og nógvar aðrar dupult funktiónir.

Men gott er, býtt av mær at tosa teimum ímóti, sum nær um ikki fáa flutt seg av berari vitan, og so eg við mínari handverkaraútbúgving.

Sigurd segði, at talið av sjómonnum skuldi hálverast og heldur skuldi teir farið inn á kontórini í Havn, har teir kunnu renna runt við A4-ørkum til reseptionir og eta pinnamat, tá fór landið at blomstra.

Men eg eri beingin fyri, at við ongari fiskivinnu hevði sæð ljótt út í Føroyum.

Men til allarrsíðst Sigurd Poulsen, Sandoyartunnilin er samtyktur, hugsa heldur um tann ungdóm, sum fer úr Sandoynni og kemur ongantíð aftur.

Ella børn, sum hava serligan tørv, tá muga foreldrini flyta í miðstaðarøkið.

Ella sandoyarfólk sum arbeiða í miðstaðarøkinum sum mugu av húsum kl 06.00 á morgni og er ikki heima aftur fyrr enn kl 19.00 á kvøldi.

Men Sigurd, alt hetta hevur ongan týdning fyri teg, tí tú gongur út í bilin og koyrir reipslongd, so er tú heima.

Tað hevði passað munandi betri at kanna umstøðurnar hjá Sandoynni, áðrenn tú fórt at útpeika tína hjartans meining. Í dag standa bilar dagliga eftir við ferjuleguna, og nú byrjar eisini at skorta hjá øllum ferðafólkunum at koma við.

# YOU DON´T KNOW JACK SCHIDT!

**Hann hevur DJað saman við Daft Punk, Trentemøller, Gus Gus, Booka Shade og Trabant. Hann hevur hitað upp fyri Björk, Kraftwerk og Underworld, og hann er heitasta og hippasta navnið á íslendska DJ pallinum anno 2008. Undirbeat er 26. apríl errið at bjóða: Jack Schidt!**

Fyrsta útlendska DJ vitjanin hjá Undirbeat var við íslendska Magga Lego, ið er kanska tann kulasti av »old school« DJarunum í Íslandi, t.e ættarliðið við rót afturi í 80unum. Tí er tað uppá sítt pláss, at vit komandi leygarkvøld fáa vitjan av Jack Schidt, sum í løtuni er feskasta og feitasta navnið úr yngra ættarliðnum.

### Pallkavari við stíli

Í gerandisdegnum eitur hann Margeir Steinar Ingolfsson og er ein vanligur, ungur íslendingur, búsitandi í Reykjavík. Tá hann fer afturum DJ pultin, broytist hann til uber peppaða og skít svaka Jack Schidt, ið festir í fjúsið á sjálvt dovnastu dintlum.

Jack Schidt dugir kynstrið at fáa fólkið upp at gartera. Pallkaving er ei longur eitt ekslusivt hugtak innan metal heimin, tí Jack Schidt hevur gjørt sítt fyri at fáa hesa frálíku siðvenju inn í DJ verðina. Hann hevur fleiri ferðir pallkavað niður í kókandi og dansandi fjøldina, og er m.a kendur fyri at vera “the first DJ in the world to stage dive into the crowd!”

Um føroyska dansifjøldin kann liva upp til peppaðu og skítsvøku lótirnar hjá Jack Schidt, kann DJ pallkaving ivaleyst eisini gerast eitt kent hugtak í føroyska DJ umhvørvinum.

### Jack Schidt og Trentemøller

Jack Schidt er tó ikki bara svakur og peppaður, men eisini tjekkaður og stílfullur. Hann gongur upp í sítt DJ virksemi og sína tónleikaproduktión við stórum álvara. Og latum okkum so ikki gloyma strømmu, reyðu kovboybuksurnar, sum koyra stílin heim fyri fullum útblástri!

Jack Schidt hevur verið DJ í skjótt sekstan ár, og hevur øll árini verið fastur DJ á klubbum í Reykjavík. Hann byrjaði fyrst í 90unum á náttklubbum sum Borgin og Rosenberg og er síðani farin víða um. Hann hevur verið regluligur DJ á m.a Sirkus, Kaffibarinn, NASA og á Iceland Airwaves festivalinum, ið hann eisini hevur umboðað uttanlands. Á Iceland Airwaves 2007 framførdi Jack Schidt saman við ongum minni enn “Mister Minimal Techno” Trentemøller fyri pakkaðari fjøld á Kaffibarrinn í downtown Reykjavík.

Umframt virksemið í Reykjavík er hann javnan at hoyra á klubbum í New York, London, París og Berlin, og í seinastuni hevur hann havt fleiri væleydnað DJ gigs í Eysturevropa. Heima í Íslandi er hansara regluliga og stak skemtiliga “post-Christmas” disco kvøld vorið eitt afturvendandi tiltak í jólafrítíðini.

### Umtóktar útgávur

Innan útgávuvirksemi hevur Jack Schidt eisini verið virkin, og hevur m.a útgivið á Pineapple Records, ið er nýggja plátufelagið hjá tónleikabólkinum Gus Gus. Í 2006 savnaði og miksaði hann savnsfløguna »The Blue Lagoon Soundtrack« til kenda baðistaðið Bláa Lónið. Ein útgáva, ið fekk framúrskarandi góð ummæli. Í 2007 savnaðu og miksaðu Jack Schidt og Kasper Bjørke (DK) eina fløgu til VOX-Hilton Hotel í Reykjavík. Fyri framman standa eisini nógvar nýggjar verkætlanir, og so sjálvandi ein ørgrynna av DJ framførslum í Reykjavík, New York, London, París o.s.fr.

### Tók ferðina til Føroyar framum

Komandi vikuskifti stendur Tórshavn fyri skotum, tá Jack Schidt setur seg í flogfarið við kós móti Føroyum. Hóast hann er nógv umbiðin, hevur hann sett sær tíð av til at koma hendavegin. Hann hevði í roynd og veru eitt Reykjavík gig á skránni sama vikuskiftið sum Undirbeat, men flutti tað, soleiðis at gjørligt var at koma til Føroyar.

Jack Schidt fer heilt einfalt at koyra stílin, og tað skuldi ikki undra, um býurin leygarnáttina verður málaður áleið líka reyður sum eyðkendurkovboybuksir hansara.




Tað verður í øllum førum totalt tjekkað og totalt genialt, tá Jack Schidt fer á pall í til Undirbeat í Cippo komandi leygarkvøld, 26. apríl. Les meira um Undirbeat og Jack Schidt á undirbeat.com.